**Grasturkari**



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.07.04**

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800



**JBJ BYGGING**

*Har tykkara ynski verða sett í hásætið*

*Alt innan timburarbeiði og stoyping verður gjørt skjótt og bíligt, um alt landið.*
- Sethús
- Umvælingar
- Stoyping av grundum v.m.

*Óbindandi tilboð verða givin*

*Eisini umboða vit nýggju amerikansku bjálkahúsini.*
*sí www.amerlog.dk*

JBJ BYGGING
Tel 213181
Tel 213182
Tel 213183
Oman Stóragarð 9
jbj@email.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Ólavsøkan 2004**

Viðvíkjandi sølu og tiltøkum

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til mánadagin 21. juni 2004 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 21. juni 2004 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununar.

www.torshavn.fo



Sosialurin í Sosialurin


Byggimálið í Hoyvík:

# Heðin Mortensen framvegis tættur sum tunnan


BYGGILOYVI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*




Í gjár segði Heðin Mortensen, leiðari í byggi- og býarnevndini, við Sosialin, at hann skjótast gjørligt skuldi kannað øll skjølini, ið viðvíkja byggingini í Maritugøtu og Torkilsgøtu, og at hann onga viðmerking hevði til málið, fyrr enn han hevði lisið alt tilfarið.

Men í dag hevur Heðin heldur onga viðmerking, hóast hann hevur lisið skjølini. Hann hevur kallað inn til byggi- og býarnevndarfund mánadagin, og viðmerkingin er útsett inntil eftir henda fundin. Hann sigur, at hann hevur givið fundarboð, fyri at nevndin skal kanna, um tingini viðvíkjandi byggiloyvinum hjá Guttesen og Staksund, eru í lagi. –Hetta er rætta forum at diskutera málið í, sigur hann.

Við á fundinum verður eisini fyrisetingin, t.v.s. byggieftirlitið og plandeildin hjá býráðnum. Fyrisetingin skal greiða fundarfólkunum frá øllum tí, sum farið er fram í málinum.

Spurdur, um tað ikki er merkisvert, at íbúgvarnir í Torkilsgøtu bert hava fingið fyribilstekningar útflýggjaðar, tá byggifelagið sigur seg hava havt góðkendar tekningar, svarar Heðin Mortensen, at tað ynskir hann ikki at viðmerkja enn. Hann sigur, at einki verður sagt fyrr enn eftir fundin. –Men er nakað ivasamt farið fram, so skal tað avdúkast, sigur hann.

Vit hava tískil ikki annað val, enn at bíða inntil fundurin mánadagin er lokin. Tá skuldi so endiliga borið til at fingið viðmerkingar frá býráðnum til hetta fløkjuta málið.

# Heim! hevði uppiborið størri áskoðarafjøld


UMMÆLI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin*




Leikurin hjá tannáringabólkinum í sjónleikarhúsinum er nú liðugur at ganga. Tey hava dugliga vant síðani oktober í fjør, og tað var ikki smávegis, sum kom burturúr. Tey ungu megnaðu at fáa ein álvarsaman og djúpan leik at sýnast trúðverdigan, hóast leikurin viðgerð tung evni sum deyða, trúgv, fátækradømi, harðskap og vónina um okkurt betri.

Tey megnaðu at fanga áskoðaran, og halda honum føstum, í tann hálvanannan tíman, sum leikurin vardi. Tey megnaðu væl at lýsa hesi russisku børnini, sum ikki liva við dreyminum og vónini um eitt betri lív, men sum ongan møguleika hava at broyta lagnuna, sum í flestu førum eisini endar syndarliga. Leikurin vísti á og fekk áskoðaran at hugsa um stóru eksestensiellu spurningarnar, sum so ofta tykjast verða gloymdir í okkara vanabundna og lætta gerandisdegi. Og tað er alla æru vert, tá hugsað verður um, at leikararnir eru so ungir. Halda tey á, er heilt víst, at onkur av leikararnum veruliga kann skapa sær eina framtíð innan leiklistina.

Tá tað er sagt, má eisini viðmerkjast, at leikurin av og á hevði ein farra av fólkaskúla sjónleiki, við antin ov lítið ella ov nógv av artikulatión. Av og á varð tosað so ótýðiligt, at ikki hoyrdist hvat sagt varð, meðan tað av og á var so yvirdrivið týðiligt at tað tyktiskt ónatúrligt.

At tað vóru so fá, ið nýttu høvið at síggja leikin er spell. Hesi ungu vóru dugnalig og høvdu veruliga uppiborið fleiri áskoðarar. Vónandi fara tey at finna pláss í Sjónleikarhúsinum, soleiðis, at tey ungu fáa møguleika at framføra nakrar ferðir afturat.



# Nýtt listarligt umhvørvi í Eysturoy

**Tøting í Syðrugøtu hevur nú skapt eitt nýtt listarligt umhvørvi í Eysturoy, sum væntandi eisini fer at draga fleiri fólk inn á gólvið**


LIST
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Uffe Bærentsen, Petur Martin Petersen og Hallbera Ólavsdóttir.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tøting í Gøtu hevur nú fingið sítt egna gallarí. Í bygninginum í Syðrugøtu hava tey sett hølir í stand til endamálið. Hetta eru ljós og snotulig hølir, sum eru væl egnaði til endamálið. Hølini eru í tveimum – fyrst eitt niðara við góðari trappu uppá til tað ovara.

Seinasta fríggjadag bjóðaði Tøting til móttøku í samband við, at gallaríið alment varð tikið í nýtslu.

Væl av fólki var til móttøkuna, sum var hugnalig við avslappandi klaver-og fióltónleiki.

Tað var Petur Martin Petersen, sum starvast á Kunningarstovuni í Fuglafirði, ið fekk heiðurin at lýsa hølini at vera alment tikin í nýtslu.

Hann hevði eina áhugaverda og stundum skemtiliga røðu.

Petur Martin greiddi frá Gregersen-familjuni, sum í sínari tíð trúði uppá tað, sum mong hildu vera ómøguligt, nevniliga at gagnnýta føroysku ullina og virka hana til vakrastu pløggini.

Hann greiddi frá gongdini upp ígjøgnum árini, bæði tá ið tað gekk væl, og tá ið tað gekk minni væl í hond.



*Løtan á Tøting var hugnalig við vøkrum klaver-og fióltónum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Framsýning

Stór framsýning hongur uppi, nú gallaríið hjá Tøting alment er latið upp.

Á framsýningini eru málningar hjá so mætum listamonnum sum Sámali Toftanes, Øssuri Mohr, Frits Johannesen og Heðini Kambsdal. Eisini eru eiðishjúnini, Elisabeth og Páll Ellingsgaard, við á framsýningini við síni glarlist, har tey gera ymiskar lutir úr glasi, eitt nú avbera vakrar klokkur, vasar og myndir úr glasi.

Einir 26 málningar eru við á framsýningini umframt lutirnar hjá Elisabeth og Pálli.

Við gallarínum hjá Tøting, er eitt nýtt listarligt umhvørvi skapt í Eysturoynni.

Lítið er at ivast í, at Tøting, sum fyritøka, fer at fáa fleiri vitjanir, bæði av føroyingum og útlendingum, sum við hesum eisini fáa eitt nýtt høvi at síggja tað útboð, sum fyritøkan hevur av vørum, skaptum við okkara egnu hondum og úr okkara egna tilfeingi.



*Eitt nýtt listarligt umhvørvi er skapt á Tøting í Syðrugøtu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Glarlist, sum hjúnini, Elisabeth og Páll Ellingsgaard á Eiði, gera*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Útferð yvir á Blankaskála

**Norrøna Felagið í Leirvík ger útferð yvir á Blankaskála leygardagin**


ÚTFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


Tað er vorðið alt meira vanligt, at feløg skipa fyri útferðum ymsastaðni kring landið. Gingið verður um dalar og fjøll, og nógvar av hesum ferðum eru eitt minnið fyri lívið. Nógv av teimum støðum, sum vitjað verða, eru søgulig á ymiskan hátt, og tí kann ein slík ferð saktanst vera ein uppfrísking av eini søgu, tú áður hevur hoyrt, men kanska ikki hevur heft teg so nógv við.

Hevur tú verið á staðnum, festir søgan seg í minnið fyri lívið.

## Blankaskáli

Komandi leygardagin skipar Norrøna Felagið í Leirvík soleiðis fyri eini útferð yvir á Blankaskála á Kalsoynni.

Farið verður av ferjuleguni í Leirvík leygarmorgunin klokkan 10, og væntandi verður ferðalagið aftur í Leirvík umleið klokkan 13.

Tað verður báturin, Alfa Pilot, ið siglir við teimum, ið verða við í ferðini.

Á ferðini fer Asbjørn Lómaklett at greiða frá søguni um Blankaskála, har eitt stórt skalvalop í sínari tíð gjørdi av við hesa bygdina.

## Felagssangur

Norrøna Felagið í Leirvík sigur, at á ferðini verður eisini felagssangur, har Juel Høgnesen fer at spæla undir.

– Tiltakið er ókeypis, og øll eru hjartaliga vælkomin at verða við á ferðini, sigur formaðurin í Norrøna Felagnum í Leirvík, Tórhild Bjarkhamar.